# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sungu fyri tónaskaldinum



*Knút og Anna Olsen. Knút hevur komponerað nógv av kendu løgum okkara, eitt nú »Føroyar mín móði, hjá Poul F. Joensen, sum hann gjørdi lag og sats til í 1972*

**Anna og Knút Olsen í Havn vóru tikin á bóli við kórsangi á jarnbrúdleypsdegnum í gjár**

Í gjár 18. oktober var 40 ára brúdleypsdagur hjá Onnu og Knút Olsen í Havn. Hetta vildu døtur teirra, Jensina, Estrid og Anna Maria markera onkursvegna, um so foreldrini ikki ætlaðu tað stóra hendan dagin.

Tær vendu sær tessvegna til kórleiðaran Ólav Hátún, ið var fúsur at skipa fyri og savna saman eitt lítið kór, sum eftir eina venjing troppaði upp á grasplenuni framman fyri húsini hjá ovfarna jarnbrúðarparinum, ið stóðu sum kánus í stovuvindeyganum og lýddu á sangin.

Tað var ikki frítt, at okkurt tárið rann meðan kórið framførdi kenslubornа brúðarsálmin "So hugnaligt og so fagurt er" og tá kórið inni í stovuni hjá jarnbrúðarparinum hevði sungið fýra av vældámdu sangunum hjá Knút, tóktist eisini tónaskaldið ikki sørt rørdur.

Kórið endaði við at syngja kenda klassikaran "Føroyar, mín móðir" við orðum eftir Pól F. Joensen, sum Knút Olsen gjørdi lag og sats til í 1972.





*Ólavur Hátún stjórnaði lítla kórinum, sum var »stovnað« til tess at heiðra jarnbrúðarparinum í gjár*

## 25 ára starvsdagur

Týsdagin 13. oktober 2009 skipaði býráðsleiðslan fyri hátíðarhaldi í býráðshøllini fyri Gunnleyg Kallsberg Dánjalsson, fulltrúa á Teknisku Umsiting, í sambandi við hennara 25-ára starvsdag í býráðsumsitingini.

Gunnleyg K. Dánjalsson starvast í dag sum fulltrúi á Teknisku Umsiting, har hon millum annað hevur ábyrgd av og umsitur matrikkulmál, tinglýsingar- og ognarviðurskifti, gøtunøvn, ferðslumál, leigusáttmálar v.m. Eisini er hon partur av byggi- og býarskipanartoyminum hjá kommununi.

Gunnleyg hevði sín fyrsta starvsdag á Teknisku Umsiting kommununnar 1. juli 1984, og eftirsum sjálvur dagurin var lutvíst í summarferiutíð, varð hann hildin týsdagin 13. oktober, har býráðsleiðslan bjóðaði til eina hátíðarløtu í býráðshøllini.

Millum gestirnar vóru starvsfelagar og nevndarlimir í teimum nevndum, sum Gunnleyg, hevur nógv við at gera, umframt hennara næstu. Gunnleyg hevur hesi 25 árini havt ein týðandi leiklut í menningini av Teknisku Umsiting og er í dag ein lyklapersónur á deildini, sum bæði borgarar, býráðslimir og starvsfelagar fáa gagn av og kunnu kenna seg trygg við.

Hetta legði Gunvá við Keldu, borgarstjóri, eisini dent á í røðu sínari fyri Gunnleyg, har hon millum annað segði, at Klaksvíkar Kommuna, er sera heppin at hava havt og framvegis at hava hana í starvi. Borgarstjórin nevndi eisini, at dugnalig og nærløgd starvsfólk ofta fáa fleiri ábyrgdir og uppgávur álagdar, og hetta er Gunnleyg eitt sera gott dømi um.

Vegna býráðið handaði borgarstjórin Gunnleyg eitt blómutyssi og eina gávu sum tøkk fyri góða tænastu og fyrimyndarligt samstarv í hesi 25 árini. Gunnleyg takkaði hjartaliga og bar fram eina heilsan til sín arbeiðsgevara og starvsfelagar.

Eisini nýtti Ove Frederiksen, sum er ein av limunum í Gøtunavnanevndini, har Gunnleyg er skrivari, at bera eina heilsan til hana. Starvsfólkini hjá Klaksvíkar Kommunu ynskja Gunnleyg hjartaliga tillukku og ynskja henni alt tað besta framyvir við vón um framhaldandi gott samstarv í mong ár framyvir.



*Gunnleyg K. Dánjalsson og Gunvá við Keldu, borgarstjóri*